# Serstøk byggisamtykt fyri Kaldbak

samtykt á býráðsfundi 22.11.1979 endurskoða 14.12.2011

*Viðmerkingar:*
*Kaldbak er ein bóndabygd, og bøurin eigur í størst møguligan mun at varðveitast, sum hann er. Øll komandi sethúsabygging skal tí fara fram í nýggjum býlingi innan fyri bygdina. Tó hava bygdarfólkini loyvi at byggja í sjálvari bygdini, men skal tá ansast eftir, at sum minst verður tikið av bønum, og at býlingadámurin verður varðveittur. Hesi hús skulu í staðsetast á avmerktu økjunum á korti dagfest 12.07.2012. Umframt vístu húsini er loyvt at byggja fjós og aðrar bygningar til landbúnaðin. Viðvíkjandi sjálvari byggingini, so eru galdandi ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.*

Uppskot til serstaka byggisamtykt fyri Kaldbaks bygd.

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mei 1954 verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. gr.

Gr. 1. ØKI BYGGISAMTYKTARINNAR.

Økið er avmarkað sum sýnt er á hjálagda fylgikorti 1, dagfest 12.07.2012

Gr. 2. NÝTSLA ØKISINS.

1. Høvuðsøkið

Økið, sum kemur undir hesa byggisamtykt verður kannað búnaðarendamálum, har loyvt er at byggja fjós, úthús og annað, sum hevur við landbúnaðin at gera.

Herumframt er loyvt í bygdini at byggja einstøk sethús, hjallar, úthús v.m.á økjum sum eru merkt á kortskjali 1, dagfest 12.07.2012soleiðis at býlingadámurin verður varðveiddur.

2. Øki til serstøk endamál

Burtur úr høvuðsøkinum verða býttar eindirnar A, B, C og D sí fylgikort 1, dagfest 12.07.2012, til hesi endamál.

a. Eindirnar A. Sethúsabygging.

1. Økið skal einans verða nýtt til sethús og bygd mugu verða einans stakhús, ið standa fyri seg og við í mesta lagi 2 íbúðum í hvørjum húsi.

2. Á økinum kann ikki verða framt nakað slag av virki, sum við royki, gangi ella við útsjónd síni ella á annan hátt eftir meting býráðsins kann verða teimum, sum uttanum búgva til ampa.

b. Eindirnar B. ALMENN ENDAMÁL.

Økið verður kannað almennum endamálum, skúla, kirkju, samkomuhús v.m. og útiøki í hevur samband við tílík endamál.

c. Eindirnar C. HAVNA- OG VINNUENDAMÁL.

Økið verður kannað bátum, skipaferðslu, vinnuvirkjum og virksemi, ið hevur samband við hetta.

d. Eindirnar D. MIÐSTAÐARØKI

Økið er ætla til handlar, skrivstovur og tílíkt

Gr. 3 VEGIR OG LEIÐINGAR.

a. vegir sum eru at rokna sum minni týðandi húsavegir, skulu gerast við koyribreyt ikki minni enn 5 m til breiddar.
b. Høvuðsleiðingar skulu sum meginregla verða lagdar sum sýnt á leiðbeinandi kortskjali II, ið er til skjals hjá teknisku umsiting býráðsins.

Gr. 4 ÚTSTYKKINGAR

Útstykkingar innan samtyktarøkið kunnu bert verða gjørdar, soleiðis, at tær samsvara við tað, sum er sýnt á fylgiskjali I, tó so, at ovara eindin A er at skilja sum tiltaksøki, og skal útstykkjast eftir nærri góðkendari útstykkingarætlan. Innan eindirnar A, skal einki grundstykki verða minni enn 500 m², meðan býráðið kann loyva, at stykkið um sethús í bygdini verða niður til 300 m² til víddar.

Gr. 5 BYGGING, STØDD, STAÐSETING HÚSANNA O.A.

Eindirnar A. SETHÚSAØKI.

a. Nettonýtslustigið má ikki fara upp um 0,30
b. Hús mugu í mesta lagi verða bygd í einari hædd við kjallara og nýttum lofti
c. Á hvørjari ogn, skal leggjast øki til í minsta lagi 2 bilpláss.

Eindirnar B. ALMENN ØKI

Nýtslustigið fyri økið sum heild má ikki fara upp um 0,30

Eindirnar C. HAVNA- OG VINNUØKI.

a. Bygningar, neyst og føst útgerð skal setast eftir nærri góðkenning býráðsins.
b. Nýtslustigið fyri økið sum heild og fyri møguligar einstakar ognir má ikki fara upp um 0,5.
c. Eingin bygningur ella bygningspartur má verða hægri enn 8 m roknað frá meðaljørðildi (meðal við húsarhorn)

Eindirnar D. MIÐSTAÐARØKI

a. Nýtslustigið fyri økið sum heild má ikki fara upp um 0,30

ONNUR ØKI.

a. Nýggj sethús skulu í høvuðsheitum setast sum víst á fylgikorti 1 dagfest 12.07.2012.
b. Sethúsabygging skal halda somu reglur sum eru galdandi fyri eind A, tó so, at nettonýtslustigið fyri stykkir minni enn 200 m² kann fara upp til 0,45, meðan tað verður sett javnt minkandi til 0,3 fyri stykkir størri enn 200 m² og minni enn 500 m².

AÐRAR ÁSETINGAR.

Fyri allari bygging er annars galdandi reglurnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Gr. 6. HVUSSU HALDAST SKAL BYGGISAMTYKTIN

Áðrenn farið verður undir at byggja ella broyta fyrrverandi nýtslu av eini ogn, skulu fyri býráðið verða lagdar tekningar, ið sýna grundina og umhvørvi hennara, og hvussu húsini standa á grundini, stødd teirra, snið og innrætting, eins og upplýsingar skulu verða givnar um hvat húsini og grundin ætlast nýtt til, so at býráðið kann ansa eftir, at gjørt verður eftir byggisamtyktini.

Gr. 7. BYGGING IÐ ER.

Henda byggisamtykt er ikki til hindurs fyri, at núverandi løglig bygging verður varðveitt, ella at hildið verður fram við løgligari nýtslu av eini ogn. Ikki er loyvt at vaksa um hús við at byggja um ella taka tey til aðra nýtslu ímóti reglunum í byggisamtyktini.

Gr. 8. BYGGINGARMYNDUGLEIKI OG ÁTALURÆTTUR.

Byggingarmyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum

## Gr. 9. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR Í HENNI.

Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur býarpartsins, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita,

Soleiðis samtykt av Tórshavnar býráð tann 14. desember 2011

Hetta uppskot til serstaka byggisamtykt fyri ein part av Tórshavnar kommunu (Kalbaks bygd), verður góðkent við heimild í 4. gr., 1. parti í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mei 1954.

Føroya landsstýri...............................

| INNLENDISMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr.: | 12/00108 |
| Góðkent: | 18/10 -2012 |
| Dagfesting: | 18/10 - 2012 |
| Váttað: | [signature] |




A: Øki til sethús

B: Øki til almenn endamál

C: Havna og vinnuøki

C: Øki til miðstaðarbygging

## Serstøk byggisamtykt:

# Kaldbak

Samtykt 30.11.1978

Seinast broytt 12.07.2012